# Við kós moti málminum

*2. deild: HB hevur av álvara sett kós móti heiðursmerkjum, og sunnudagin vórðu gøtumenn bukaðir í trý korter*

JÁKUP MØRK

HB-GÍ 4-2 (4-0)

At sigurin hjá næstbestu HB leikarunum ikki gjørdist størri leygardagin, hava teir bert sær sjálvum at takka fyri.

Hevði neyvleikin verið størri og hugburðurin øðrvísi, hevði talan helst verið um ein nógv størri sigur, men ístaðin var um reppið, at gøtumenn aftur fingu spenning í dystin.

**Einki at roksa um**

Fyrra umfarið var at kalla bert eitt lið á vøllinum, tí HB sat á so at siga øllum.

Gøtumenn høvdu valla nakran málmøguleika, meðan teir á heimaliðnum hinvegin gjørdu sum teimum lysti.

Toppskjúttin á HB liðnum, Gunnar Mohr, hevur fleiri ferðir prógvað, at máltevinum einki bilar, og tað gekk heldur ikki long tíð, áðrenn hann hevði lagt heimaliðið framum.

Hetta fekk tó á ongan hátt heimaliðið at taka tað róligari, og stutt eftir kundi Eyðun Samuelsen økja um leiðsluna, tá hann stýrdi einum innleggi í málið.

Jónsvein Bærentsen varð spældur púrasta leysur, tá hann økti til 3-0, og líkt var til, at talan skuldi gerast um stórsigur, tá Eyðun Samuelsen gjørdi tað til 4-0, eftir at hava rundað bæði málverja og enn ein verjuleikara.

**Mistu takið**

Seinna umfarið byrjaði eins og tað fyrra endaði, og HB hevði fleiri møguleikar at økja um leiðsluna, uttan at hetta kortini eydnaðist teimum.

Um tað var tí teir nú kendu sigurin vísan, ella um teir kanska fóru at hugsa um dystin hjá 1. deild móti grannunum, skal eg lata vera ósagt, men brádliga misti heimaliðið fullkomuliga tamarhaldið.

Bárður Heinason minkaði til bæði 4-1 og 4-2 og brádliga vóru tað nú gestirnir, sum stýrdu spælinum á vøllinum.

Teir fingu tó ikki fleiri mál, og noyddust tí at taka til takkar við triðja ósigrinum í ár, og fingu sostatt heldur ikki betra um støðuna á stigatalvuni, har teir nú eru triðniðastir.

HB gjørdi hinvegin eitt skarvslop uppeftir, og hóast teir bert eru á sætta plássi, so er ikki so langt upp til heiðursmerkjaplássini.

Við spælinum, sum teir sýndu fyrstu trý korterini leygardagin, er heldur ikki óhugsandi, at teir nýta komandi vikurnar til at klintra enn longur upp á stigatalvuna.

Hóast alt er talan bert um trý stig upp, í hvussu er munnu teir ætla sær fulla úrtøku, tá grannarnir úr B36 eru mótstøðuliðið komandi vikuskifti.

**HB-GÍ 4-2 (4-0)**

1-0: Gunnar Mohr
2-0: Eyðun Samuelsen
3-0: Jónsvein Bærentsen
4-0: Eyðun Samuelsen
4-1: Bárður Heinason
4-2: Bárður Heinason



*Sum tað sæst á Janusi Rasmussen, so vóru HB leikararnir fyrstir á øllum bóltum fyrra umfarið*
**Mynd: Álvur Haraldsen**



*Hóast darvaður av brotna arminum, so er Ari framvegis ein hin týdningarmesti leikarin hjá vágamonnunum, sum leygardagin fingu sín fyrsta sigur í landskappingini hetta kappingarárið*
**Mynd: Álvur Haraldsen**

# So bragdaði hjá FS

*1. deild: Í sjeyndu royndini eydnaðist hjá vágamonnum at fáa fulla úrtøku, og nú sær brádliga betur út í botnstríðnum, har GÍ heldur óvæntað eisini telist millum liðini*

JÁKUP MØRK

FS Vágar-GÍ 2-0 (1-0)

At lívið sjáldan er lætt hja einum uppflytara, hava vágamenn prógvað so væl og virðiliga higartil hetta kappingarárið.

Hóast teir í fleiri dystum hava spælt góðan fótbólt, og hóast tað fleiri ferðir hevur riðið um snarið, so hava teir hvørja ferð verið við skerdan lut fyrstu seks umførini av landskappingini.

Hóast laku úrtøkuna, so hava viðhaldsfólkini alla tíðina vóna, at okkurt munagott úrslit fór at spyrjast burtur úr, og leygardagin bragdaði so endiliga.

**Sonni við í báðum**

Ikki tí, á pappírinum var kanska talan um ein heimadyst av tí heldur torføra slagnum, nú GÍ kom á vitjan.

Hinvegin hevur tað fleiri ferðir í ár verið sjón fyri søgn, at gøtumenninir ikki er eins væl fyri, sum teir hava verið undanfarin ár, og havandi komandi skránna hjá vágaliðnum í huga, so var tað kanska júst í hesum dysti, at útlitini fyri einum sigri undan summarsteðginum vóru tey bestu.

Tað tóktist eisini greitt, at leikararnir í øllum førum ikki ætlaðu, at talan skuldi gerast um eina endurtøku av tapinum móti HB fyrr í vikuni.

Í mun til tann dystin, var nú nógv meira bit og vilji í avrikinum hjá heimaliðnum, men skilst, so var talan tó ikki um nakra greiða yvirvág til nakran partin.

Tað eydnaðist tó heimaliðnum at leggja seg á odda, tá Sonni Johansen varð feldur í brotsteiginum. Brotssparkið setti Birgir Joensen trygt í netið, og so var frøin á heimaáskoðarunum stór, sum vera man.

Seinna umfarið var ikki stórt øðrvísi enn fyrstu trý korterini.

Liðini bæði stríddust framvegis fyri málinum, sum kundi tryggja sigurin, ella bjarga javnleikinum, men tað vórðu aftur vágamenn, sum drógu longra stráið.

Tór-Ingar Akselsen, sum er ein av ungu vágamonnunum, sum veruliga hevur gjørt vart við seg, dróg ígjøgnum høgru megin, áðrenn hann sendi inn til Sonna Johansen, sum beindi bóltin í málið.

**Bjarging í eygsjón**

At talan var um ein týdningarmiklan sigur hjá heimaliðnum er einki at taka seg aftur í.

Páll F. Joensen, sum er hjálparvenjari hjá vágamonnum segði eftir dystin, at teir sum so hava verið nøgdir við spælið í flestu av undanfarnu dystunum, men hinvegin hava teir verið alt annað enn nøgdir við úrtøkuna.

- Tað er klárt, at tá stigini ikki vilja koma, so kann hetta geva órógvan millum leikararnar, men eg haldi tó ikki, at tað hevur verið so galið hjá okkum, segði hjálparvenjarin.

Hóast sigurin ikki kundi hjálpa vágamonnum longur upp á stigatalvuna, so er eyðsæð, at teir nú eru um at hóma bjargingina fyri framhaldandi tilveru í bestu deildini.

Gaman í er talan um nakrar sera torførar dystir, hetta til summarsteðgin, men heystarskráin tykist ikki vera eins ræðandi.

Í øllum førum er tá talan um dystir móti teimum liðum, sum á stigatavluni liggja næstir vágamonnum, og fæst stig burtur úr hesum, umframt onkrum av hinum dystunum, hava vágamenn helst lyft seg av niðasta sessinum, áðrenn september mánaði er runnin.

**Er tíðin farin?**

GÍ tykist hinvegin at hava alstórar trupulleikar løtuni.

Á stigatalvuni eru teir einans á einum sætta plássi, og í løtuni eru útlitini ikki av teimum bestu fyri at koma longur upp á hesi.

Fram til summarsteðgin hava teir heimadystir móti ávíkavist B68 og B36, og skulu heiðursmerki av nøkrum slag fáast í landskappingini, er neyðugt, at seks stig fáast burtur úr hesum dystum.

Skal hetta eydnast, er tó alneyðugt, at skurarnir finna spælið frá nítiárunum fram aftur. Tá var GÍ meira enn nakað annað liðið í føroyskum fótbólti, men sum støðan er í løtuni, hevur aldarskiftið eisini viðført eitt maktskifti í føroyska fótbóltsheiminum.

**FS Vágar-GÍ 2-0 (1-0)**

1-0: Birgir Joensen (br.) 21.
2-0: Sonni Johansen 53.

**FS Vágar:**

Remigius Mikoliunis, Emil Hentze, Zylvanius Sudis, Darius Magdisauskas, Rimvydas Bakus – Tór-Ingar Akselsen, Hannus Olsen, Albert Ari Thomassen, Sonni Johansen – Birgir Joensen, Kim Poulsen

**GÍ:**

Sunnvard Joensen – Bartal Eliasen, Áslakur Petersen, Poul Ennigarð - Rúni Justinusen, Helgi L. Petersen, Magni Jarnskor, Súni Olsen, Leivur Hansen – Henning Jarnskor, Óli Hansen



# KÍ hevur fingið ferð á

*Eftir eina byrjan, sum elvdi til tos um uppsøgn av venjaranum, hava klaksvíkingar rættuliga fingið ferð á, og eru aftur farnir at tosa um eina oddastøðu*



*Seinna umfarið var bólturin aloftast á sandoyarhálvuni, og fýra ferðir eydnaðist tað Heðini og liðfeløgunum at finna meskarnar aftan fyri Waldemar Nowicki*
**Mynd: Emil Joensen**

JÁKUP MØRK

B71-KÍ 0-4 (0-0)

Tá fótbóltslandskappingin 2000 var fýra vikur gomul, vóru mong, sum longu høvdu avskrivað klaksvíkingar sum eitt veruligt boð upp á fyrsta føroyameistaran í nýggja túsundáraskeiðnum.

Tveir javnleikir og tvey tap var ikki júst tann byrjanin, sum sigursvandu klaksvíkingarnir høvdu roknað við, og so slettis ikki tá talan er um verandi meistarar.

**Vent í holuni**

Vánaligu úrslitini høvdu eisini við sær, at tosið fór at ganga um, at Tomislav Sivic sat heldur leyst í venjarasessinum, men leiðslan í felagnum legði tó dent á, at teir høvdu fult álit á venjaranum.

Fyri trimum vikum síðani kom brádliga vend í, tá KÍ í tí dystinum, sum mong róptu lagnudysturin hjá felagnum, vann á B36.

Helst er eisini rætt, at um KÍ hevði tapt tann dystin, vóru teir av álvara afturúrsigldir, men slíkt tos er nú púrasta óviðkomandi.

KÍ vann nevnliga týdningarmikla dystin, og nú tykist rættulig ferð at vera komin á spælið hjá føroyameistarunum.

Seinasta vikuskifti vórðu sumbingar bukaðir bláir norðuri í Klaksvík, og hesu ferð vóru tað so sandoyingar, sum stóðu fyri tørni.

**Trý friðarlig korter**

Fyrra hálvleik var tó lítið, sum bendi á, at talan at enda skuldi gerast um ein tryggan sigur til gestirnar, og sum so høvdu teir heldur ikki roknað við hesum sjálvir.

B71 hevur nevnliga higartil í ár víst, at teir eru sera tungir at dansa við heima á Sandi, og tey bæði tapini, sum hava verið, hava bæði verið sera tepur, og haraftúrat hava tey verið móti teimum báðum fremstu liðunum í deildini.

Heimaliðið vardi eisini borg fyrra umfarið, og av Sandi fættist, at talan var ikki um teir stóru møguleikarnir fyrstu trý korterini.

Nærmast við vóru gestirnir, tá Heðin á Lakjuni sendi á stongina eftir hornaspark, men hetta var so at siga einasta vandamikla støðan framman fyri sandoyarmálið hesi trý korterini.

Í hinum endanum var heldur ikki talan um teir stóru møguleikarnar, men heilt vandaleysir vóru vertirnir tó ikki, tí ofta manglaði sera lítið í, áðrenn talan varð um heilt vandamiklar støður.

**Sigurin ongantíð í vanda**

Í seinna hálvleiki fingu gestirnir brádliga meira ferð á, og tá góðir 10 minuttir vóru leiktir, fingu teir sett hol á. Heðin á Lakjuni breyt ígjøgnum í síðuni, og við nærmaru stong kundi Rógvi Jacobsen seta fótin á flata innleggið, og so var 1-0.

Fáar minuttir seinni býttu teir báðir um leiklut, tá Heðin kundi seta innaru síðuna á, eftir at Rógvi var sloppin ígjøgnum.

Málini bæði førdu sjálvandi við sær, at gestirnir nú fingu meira frið yvir spælið, og hóast teir fimm minuttir eftir 2-0 brádliga vórðu skerdir, tá Niclas Niclasen fekk reyða kortið fyri at hevna seg, so skilst á lagnum, at sigurin ongantíð kom í vanda.

Klaksvíkingarnir tóktust sjálvir ovfarnir av, at heimaliðið hóast yvirtalið í manningini ongantíð megnaði at leggja veruligt trýst á burtursæð frá onkrum hendinga langskotið, so hevði Meinhard millum lítið og einki at gera í málinum.

Móti endanum av dystinum eydnaðist tað gestunum at fáa tvey mál afturat. Tað fyrra, tá Marek royndi seg við langskotið móti landsmanninum og fyrrverandi liðfelaganum í B71 málinum, og tað seinna, tá Hjalgrím Elttør slapp leysur í høgru, og hegnisliga lyfti upp um Waldemar, tá hesin kom út (onkur vildi vera við, at talan var um innlegg).

**Fýra á rað**

Sostatt varð fjórði sigurin á rað veruleiki hjá klaksvíkingunum, og nú mugu teir av álvara roknast fyri at vera ein hóttan móti hinum liðunum í oddinum av stigatalvuni.

Komandi tvær vikurnar fara helst at vísa, hvussu stórum álvara hóttanin skal takast í, men megnar KÍ at hevna steypatapið móti vágamonnum og tapið frá fyrsta umfari móti NSÍ, røkist brádliga fyri, at KÍ aftur fer at teljast har, sum teir sjálvir meta seg hoyra heima.

Fram um hini liðini skal eisini roknast við, at KÍ longu hevur verið tvær ferðir í Havn, umframt at hava vitjað í Gøtu, so á pappírinum eru teir kanska liðið, sum bestu skránna seinnu helvt av kappingarárinum.

**Komandi vikuskifti avgerandi**

Sandoyingar hava hinvegin ikki heilt slept botninum enn. Seinasti dysturin hjá teimum í fyrru kappingarhálvu verður í Runavík komandi vikuskifti, og verður talan um tap í hesum dysti, verður fremsti setningur teirra at lívbjarga sær í bestu deildini.

Útlitini fyri hesum áttu tó eisini at verið hampuliga góð, tí teir hava í fleiri dystum víst, at tilfarið í manningini er á eini góðari leið.

Breiddin í hópinum tykist eisini vera størri, enn hon hevur verið undanfarin ár, og tí eru teir kanska meira mótstøðuførir mótvegis skaðum, enn fleiri av kappingarneytunum eru.

**B71-KÍ 0-4 (0-0)**

0-1: Rógvi Jacobsen 56.
0-2: Heðin á Lakjuni 63.
0-3: Marek Wierbicki 87.
0-4: Hjalgrím Elttør 90.

Dómari: Jens Petur Brattalíð

**B71:**

Waldemar Nowicki – Bernhard Petersen, Jón Brekku, Jógvan Jón Petersen – Hans Jørgin Djurhuusm, Julian Florescu, Eli Hentze, Kári Nielsen, Jákup Lamhauge – Høgni Hansen, Alex Nielsen

**KÍ:**

Meinhard Joensen – Kristian á Lakjuni, Andzrc Pacek, Jan Andreasen, Niclas Niclasen – Rógvi Jacobsen, Marek Wierbicki, Jan Joensen, John Ryan – Ove Nysted, Heðin á Lakjuni



*TB sendi runavíkingar niðureftir á stigatavluni, tá tað eydnaðist at vinna tepran 2-1 sigur í Runavík*
**Mynd: J. Jacobsen**

# TB tykist hava fótað sær

*2. deild: Aldursforsetin, sum seinnu árini hevur verið saknaður, hevur nú aftur sett kós móti bestu føroysku fótbóltsdeildini*

NSÍ–TB 1–2 (0–1)

Hóast tað hevur gingið eitt sindur upp og niður, so tykist TB hava fingið fótafesti í toppinum av næstbestu deildini – fyribils í hvussu so er. Óli Johannesen hevur styrkt væl um, og nú er Bogi Johannesen eisini komin heim í summarfrí. Hann var allar 90 minuttirnar í Runavík í álopinum saman við Dan Mortensen.

TB kom á odda so at siga beinanvegin. Málskjútti var evnaríki Bárður Dimon, sum eftir gott uppspæl eftir miðásinum smekkaði flatt úr átjan metrum og út í annað síðunetið.

Miðskeiðis í 2. hálvleiki økti TB. Eftir hornaspark í vinstru frá André Dalfoss fekk Óli Johannesen við nærra stólpan vinstra fót á. Bólturin fór innfyri málið, har eitt heimabein stýrdi honum inn um strikuna. Sum vit hava skilt tað, so varð málið skrásett at vera sjálvmál.

Tá tað restaði eitt korter minkaði heimaliðið um munin. Dagfinn Olsen umsetti brotsspark til mál. Brotið varð dømt móti Óla Johannesen, sum dómarin metti hevði skumpað ein mótstøðumann í ryggin. Tvøråmenn vóru ikki samdir við dómaran.

Síðstu løtuna legði NSÍ eitt støðugt trýst móti TB málinum, men teimum eydnaðist ikki at skora hjá Magna Hentze. Hesa ferð var Óli Johannesen aftastur í verjuni hjá TB. Frammanfyri seg hevði hann Magna Petersen og Andrass Nolsøe, meðan Jón Tórður Holm í 1. hálvleiki var á verjukenda miðvallarplássinum í 1. hálvleiki. Í 2. hálvleiki loysti Tórður Mortensen hann av.

NSÍ telist framvegis millum oddaliðini í 2. deild. Men sjálvandi verður tað torført hjá teimum at varðveita ta støðuna, tá felagið eisini er umboðað í bestu deildini. Á Skálafjarðarstevnuni fær NSÍ komandi leygardag vitjan av hinum Suðuroyarliðnum í næstbestu deildini. Royn skal spæla í Runavík leygardagin.

TB man fara at standa seg hampuliga væl í 2. deild. Men tað er týðuligt, at um tað eydnast at flyta upp, so skal liðið styrkjast og hópurin skal gerast breiðari.

Komandi leygardag áttu tað at verið líkindi hjá TB at fingið fulla úrtøku. Tá fáa teir vitjan av KÍ, sum er aftast í 2. deild.

JH

**NSÍ–TB 1–2 (0–1)**

0–1: Bárður Dimon
0–2: sjálvmál
1–2: Dagfinn Olsen br